## Runavíkar kommuna

søkir eftir

# Pedagogi til Barnagarðin á Mýrunum

**Søkt verður eftir:**

- 1 pedagogi 30t um vikuna, til barnagarðstovu

**Førleikakrøv:**
vit sóknast eftir starvsfólki, ið eru nýhugsandi og ígongdsetandi og eru opin, jalig, duga at veita umsorgan og hava góð samstarvsevnir. Vit ynskja, at tú, í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur, kann skapa ein fjølbroyttan, mennandi og tryggan dag fyri hvørt einstakt barn.

**Vit bjóða tær:**
eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum í dagligdegnum, har tú blívur ein partur av okkara breiða starvsfólkahópi, har tað námsfrøðiliga arbeiðið verður raðfest høgt. Dentur verður lagdur á, at møguleiki er fyri fakligari og persónligari menning.

Starvið verður sett 1. apríl 2010 ella eftir nærri avtalu. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Eyðnu Norðfoss, leiðara ella Jastrid Weihe, varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. mars 2010, kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26 · Postrúm 139
FO-610 Saltangará

Í Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur, 3 barnagarðsstovur og 1 stova til børn við serligum tørvi. Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felags/rørslurúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið.

---

FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN

# PASS

**Passframleiðslan fyri alt landið fer fram í Danmark og er passavgreiðslutíðin umleið 2 til 3 vikur.**

**Vinarliga biðið tí um passið í góðari tíð.**

Umsókn um pass fæst á øllum politistøðunum og á heimasíðuni www.politi.fo.

Umsóknin skal latast inn við at venda sær persónliga til politiið.

**Avgreiðslutíðir:**
Politistøðin í Klaksvík, við Sandin,
mánadag – fríggjadag kl. 09.00 – 15.00

Politistøðin í Runavík, Mýravegur 2,
mánadag – fríggjadag kl. 10.00 – 15.00

Politistøðin í Tórshavn, J. Broncksgøta 17,
mánadag – fríggjadag kl. 10.00 – 15.00

Politistøðin í Miðvági, Hornavegur 2,
mánadag – fríggjadag kl. 10.00 – 15.00

Politistøðin á Sandi, Eystanvegur 10,
mán – frí. kl. 09.00 – 12.00 og kl. 14.00 – 16.00

Politistøðin á Tvøroyri, Kirkjubrekkan 11,
mánadag – fríggjadag kl. 10.00 – 15.00.

**Skjøl at hava við, tá pass verður umbiðið:**
- Gamla passið
- Dóps-, føði- ella navnaseðil og møguligt vígslubræv
- Nýggja passmynd støddd 35 x 45 mm.

**Passið skal gjaldast, tá tað verður umbiðið.**
Persónar frá 18 ár til og við 66 ár ......kr. 400,00
Persónar yngri enn 18 ár ....................kr. 115,00
Persónar, sum eru fyltir 67 ár.............kr. 150,00.

**FØROYA LANDFÚTI**

***tann 1. mars 2010***
***Karen Marie Olesen***

---

**Havnar Handverkarafelag**
Stoffalág 60 · Box 203 · FO-110 Tórshavn

## Frá Havnar Handverkarafelag og Eftirlønargrunni Havnar Handverkarafelags

**Ársaðalfundurin verður mikudagin 24. mars 2010 kl. 19.00 í hølum felagsins Stoffalág 60.**

**Skrá samb. § 25 í lógini:**
1. Val av orðstýrara
2. Frágreiðing frá farna árinum.
3. Roknskapur til góðkenningar.
4. Innkomin mál.
5. Val av nevnd
6. Val av tveimum grannskoðarum
7. Ymiskt

**Aftaná aðalfundin verður aðalfundur í Eftirlønargrunninum við hesi skrá:**

**Skrá samb. § 8 í viðtøkunum:**
A. Val av orðstýrara
B. Frágreiðing frá nevndini um virki grunnsins í farna ári
C. Framløga og góðkenning av roknskapi og fíggjarstøðu
D. Støða verður tikin til, hvat gerast skal við møguligt avlop ella hall
E. Val av nevndarlimum
F. Val av grannskoðara
G. Møgulig mál frá nevnd/limum

*Sí lýsing á www.handverk.fo*
**Havnar Handverkarafelag**

---



# Sethús í Klaksvík

**Sethúsini Garðavegur 13 til sølu**
**Nærri fæst at vita, við at venda sær til:**
**Tel 455161 - 225130**
**Lægsta boð 1,5 mill.**

---

**Reyði Krossur Føroya**

# Aðalfundur

Reyði Krossur Føroya hevur aðalfund
**sunnudagin 21.03.09, kl. 15:00**
í Húsinum hjá Reyða Krossi,
Bryggjubakki 10, Tórshavn

Uppskot at viðgera á aðalfundinum skulu sendast til formannin í seinasta lagi 2 vikur undan aðalfundin.

Allir limir hava rætt at møta.

**Limagjaldið fyri húski er kr. 150,-**
**og feløg/stovnar kr. 400,- fyri ár 2010**

Kann gjaldast í øllum peningastovnum.

Boks 1015 · 110 Tórshavn · Redcross@Redcross.fo

---

# Kom og dansa

## Rock´n roll skeið

**Í fimleikahøllin á Føroya Læraraskúla**

**Rock´n roll bryrjunarskeið**
Byrjar 9. mars. 3 týskvøld á rað kl. 19.15 – 20.45

**Rock´n roll framhaldsskeið**
Vikuskifti 12 og 13 mars.
Fríggjakvøld kl. 19 – 21 og leygardag kl. 14 – 16
Fyri tey, sum hava eitt ella fleiri byrjunarskeið.
Norskir instruktørar

***Øll eru vælkomin – støk/pør***

***Kostnaður 150,-kr***

***Tilmelding: sms´a, skriva ella ring á tlf. 263845 marilyn.danielsen@skulin.fo***



***Kom og Dansa***